## DAGSINS MEINING

# Gloymið ikki eitt samhaldsfast grundstøði!

Løgmaður er óivað á rættari leið, tá hann ásannar, at fakfeløgini mugu vera við frá fyrsta degi, nú landsstýrið aftur hevur sett sær fyri at loysa tað nógv umrødda eftirlønarmálið og fremja ein veruligan eftirlønarreform.

Men spurningurin er, um tað ikki er dekan ov seint, tí nú hava øll fakfeløgini á privata og almenna arbeiðsmarknaðinum fingið sær eftirlønarskipanir fyri limr sínar. Eisini tey stóru feløgini sum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Fiskimannafelag.

Men tá tað er sagt, skal leggjast afturat, at fleiri eftirlønarskipanir eru ikki nøktandi. Sambært skipanini hjá summum av feløgunum, t.d. Havnar Arbeiðsmannafelag og Starvsmannafelagnum, er eftirlønargjaldið rættiliga lágt.

Tað er í hvussu er galdandi fyri teir tilkomnu limirnar, og tí má okkurt munagott koma afturat í hesum feløgum, og sjálvandi fyri limirnar í teimum feløgum, sum hava bíðað til landsstýrið kom við eini ella aðrari skipan.

Enn er so lítið komið fram, og eftir tí sum løgmaður hevur sagt, so skal arbeiðið byrja við blonkum arki. Orsøkin til hetta er óivað hon, at seinast fór Almanna- og Heilsumálastýrið at arbeiða við málinum, grundað á uppskotið um “fólkatrygging”.

Hetta er ein politisk ætlan hjá Fólkaflokkinum, sum ikki bygir á samhaldsfesti, og tí vendu bæði fakfeløgini og Tjóðveldisflokurin og Javnaðarflokkurin tummilin niðureftir. Eftir hesum uppskoti verður útgjald sett í mun til tað, sum ein løntakari hevur goldið inn.

Tað merkir, at ein løntakari, sum hevur havt eina lítla løn í arbeiðsárum, fær eisini eina lítla eftirløn. T.d. arbeiðsfólk, fólk í útoyggjum ella fólk í útjaðaranum, har arbeiðsinntøkan í flestu førum er rættiliga avmarkað.

Mótvegis hesi ætlan hevur Javnaðarflokkurin víst á Samhaldsføstu eftirlønina sum eitt alternativ. Um henda varð bygd út, sum uppruaIiga ætlanin var, hevði útgjaldið verið komið upp í fleiri túsund krónur um mánaðin í dag.

Uttan at taka munnin ov fullan, hava borgarligu flokkarnir við Fólkaflokkinum á odda saboterað hesa ætlan. Alternativið – fólkatryggingina – hava teir ikki kunnað sett í verk, og fleiri ár eru liðin og fleiri eftirlønarskipanir eru settar í verk.

Hetta hevur gjørt tað, at tað verður upp aftur verri at fremja ein veruligan eftirlønarreform, sum flestu flokkar eru samdir um má koma. Í øllum hesum er so spurningurin, hvussu verður við fólkapensjónini og Samhaldsfasta.

Anaðhvørt tann samhaldsfasta fólkapensjónin ella Samhaldsfasti má vera eitt grundarlag, sum øll eiga at hava rætt til. Hvat so kemur omaná, verður óivað eitt stórt politiskt mál í komandi tíðum, og spurningurin er her, um vinstrivongurin megnar at halda fast um eina munadygga samhaldsfasta skipan.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fyrstu tríggir dagarnir í ST livandi og áhugaverdir

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður úr ST í New York*



**Við 191 so ymiskum londum til støddar, í búskapi, arbeiðsstøðum, mentan og stýrisskipanum er torført at fáa úrslit**

Týsdagin, eg kom út úr stóra tingsalinum, rendi eg meg á eitt risafjølmiðlalið, sum tosaði við og tráspurdi Hans Blix, oddamannin í Irak-kanningunum, um nær hann aftur slapp inn í landið at halda fram við kanningunum.

Hesin kapaciteturin, sum eg eisini sá mikudagin undir sjálvari Irak-viðgerðini í Trygdarráðnum - stóð fattur, sterkur og róligur, onkuntíð smílandi og til aðrar tíðir álvarsamur.

Hóast tey framhaldandi koyrdu á hann, nevndi hann fyri tað mesta: »Latið okkum bíða eftir orðaskiftinum í Trygdarráðnum í morgin«. Hugvekjandi er at síggja, at »talutíðir« er ikki endiliga nakað høgt verður gingið uppí.

**Talutíðir**
Irak talaði ein heilan tíma í Trygdarráðnum, har umboðið vardi seg og fyri tað mesta leyp á USA og Stórabretland, tók upp í saman, aftur og aftur, um somu søguna vit dagliga hoyra úr fjølmiðlunum, so har var einki nýtt í tí hann segði.

Ellen Margrethe Høj, danski ST-ambassadørurin talaði vegna ES, í sambandi við danska formansskapin í ES. Kvøldið fyri vóru vit øll boðin til en døgurða í hennara vøkru embætisíbúð á 14. hædd, har vit høvdu gott útsýni yvir Central Park og hetta ljóshavið, sum eyðkennir bygningarnar í New York. Meðan vit stóðu á altanini, prátuðu vit um hvat elprísurin í New York mundi vera. Hon helt fyri við einum smíli »væsentlig lavere end i Danmark«. So eg helt fyri, at skuldu vit helst á heilt aðrar leiðir, um vit skuldu sammeta við Føroyar.

Men tað var hugtakandi at hoyra, hvussu talan í Trygdarráðnum hjá danska ST-umboðnum varð broytt, har øll limalondini í ES, skuldu góðkenna hana.

Seinasta góðkenningin og tað seinasta, sum skuldi fáast uppá pláss kom ikki fyrr enn kl. 9:05 mikumorgunin, sum talan skuldi haldast.

**Danmark vegna ES**
Røðan var uppá hálva aðru síðu, og endaði við, at »vit vilja heita inniliga á allar limir Trygdarráðsins at taka eina skjóta avgerð, sum hevur við sær eitt dygt trýst á Irak og vísir mest møguligu hjálp innan ráðið«.

Áhugavert, kanska ein færri av óhugna, var at hoyra umboðið fyri Libya, sum ikki hevði skrivaða røðu, men sat og rópti og hótti Trygdarráðið, »sum ikki gjørdi sínar skyldur«, tók sjálvandi undir við Irak, »sum ikki gjørdi sínar skyldur«, tók sjálvandi undir við Irak, sum hann tók til »allur heimurin bara stóð og hugdi at«, meðan henda ómenniskjaliga herferð fór fram ímóti landinum«.

Eg spurdi ein, sum eg sat við síðuna av, um hetta vanliga kom fyri, ein tílíkur røðuháttur. Nei, segði hann, hann hevði verið við fleiri ár. Tílíkt hevði helst ikki hent síðani Krutsjov, sovjettiski leiðarin, tók skógvin av og lammaði hann í borið.

Ja, her er so nógv annað av áhuga og fleiri røður, eitt nú um Kuwait, sum fannst at Irak og arabisku londini, sum meira ella minni hildu saman og á sín hátt ávaraðu um álop.

**Fund hvønn morgun**
Annars møtast vi hvønn morgun inni á donsku ST-missiónini, sum er umboðsstovan har vit fáa fyrilestrar, frágreiðingar og upplivingar innan ST-arbeiðið. Vit kunnu eisini fylgja nevndararbeiðnum í teimum seks nevndunum, men tær eru ikki veruliga komnar í gongd enn.

**Einki er lætt**
Ja, hvussu skal heimurin liva í friði, mong hjúnaløg sindrast, smá kommunustýri eru ósamd, løgtingið stríðist, av og á eitt sindur harðliga. Her er talan um 191 lond av øll sløgum, mentan, búskapum, stýrisskipanum og hugsanum.

Í eini av vøkru gongunum stendur áhugaverd mynd av fólkum, sum Nancy Reagan avdúkaði í 1985. Har standa orðini: »Ger ímóti øðrum, tað tú vilt skal verða gjørt móti tær«. Lætt at lesa, men tungt at eftirfylgja.

Í øllum hesum gleðast vit um at fáa loyvi at liva í einum so góðum landi sum Føroyar eru tað.

# Føroya Fróðskaparfelag 50 ár

**50 ÁR**
*Tíðindaskriv*

17. desember í ár eru 50 ár liðin, síðani átta menn komu saman í Bátahøllini á Debesartrøð at stovna eitt føroysk vísindafelag. Navnið gjørdist Føroya Fróðskaparfelag og mið tess at 1) at taka upp samstarv við tey fólk her á landi, sum áhuga hava fyri vísindaligum starvi, 2) á føroyskum at geva út Fróðskaparrit, ið er felagsárbók, 3) at fáa til vegar vísindaligar bókmentir og virka fyri at fáa settan á stovn ein ognargrunn og soleiðis royna at leggja støðið undir ein komandi lærdómsstovn í Føroyum.

Hetta vóru høg mið at seta sær í 1952, men væl hevur vignast. Limatalið er vaksið til 165, harav 100 eru búsettir í Føroyum, 50. bók av Fróðskaparritum kemur út í ár, hópin av vísindaligum bókmentum eru fingnar til landið í býti við Fróðskaparrit - og seinni Supplementa til Fróðskaparrit - og ikki einans støðið, men sjálvur lærdómsstovnurin var veruleiki longu í 1965, tá ið løgtingið samtykti lóg um Fróðskaparsetur Føroya.

Og so er hetta bert partur av avrikum felagsins. Her er fyrst og fremst at nevna Málstovnin og Orðabókagrunnin, ið hava verið til almikið gagn fyri føroyskt

*Framhald á síðu 11*

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Rullandi redaktionin:**
tel. 220507

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Hvat er synd

**Asta V. Joensen**
*Tlf. 220247*

Hetta er sjálvandi ikki hvat mín meining er ella tín, tí tað hevur ongan týdning. Men hvat sigur Gud, tí Bíblian er Gud orð, tað sum Gud hevur sagt, líka mikið um tú ella eg trúgva tí ella ikki. Og Guds orð sigur: »Villist ikki, hvørki siðloysingar = sex uttanfyri hjúnaband og sex ímóti natúruni.

Nú skulu øll verða so human, men hyggi eftir djórunum, tey finna betur út av tí enn menniskjuni.

Men í Guds orði stendur ikki bara um siðloysi, men eisini um ovát, drykkjuskap, at lúgva, havisjúka = vilja hava alt o.s.fr. hesi skulu ikki arva ríki Guds. Hvat er synd? Tað, sum Gud kallar synd, ella orðarætt at fara skeivur av málinum, og málið er himmalin, eitt ævigt lív heima hjá Gudi og tað rokni eg við, at øll fornuftig fólk vilja koma til, og tað verði ongar góðar gerðir ella dópur, sum førir okkum hagar, tað er bert ein vegur, og hann eitur Jesus.

Hann er nemmiliga ikki ein religión, men ein persónur. Evangeliið er at vit kunnu siga ella »bera« alla okkara synd til Jesus, Hann sum vann okkum sigur á Golgata. Eg havi gjørt tað, og geri tað støðugt. Tú kanst eisini fara til Jesus við tínum syndum.

Enn er tíð, hvussu leingi vita vit ikki, men leingi verður tað ikki. Bíblian sigur: »Í dag tá tú hoyrir Harrans kall, tá forherð ikki hjarta títt«. Vit eiga ikki ímorgin.

Um tú vilt vita hvar hetta stendur í Bíbliuni ella hava eina samtalu ert tú vælkomin at ringja.

P. S. Lesið Bíbliuna, alla Bíbliuna og verð sælur = hjartans lukkuligur. Tann best dokumenteraða bókin í heiminum vísindaliga.

# Skerdi blokkurin

**Sonni Jacbsen**



Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin lovaðu okkum, Fóroya fólki, so staðiliga, at ongin avleiðing fór at standast av at skerja blokkstuðulin frá dønum við útvið 400 mill. kr. Men, sigast má, at vit flestøll vistu betur. Hetta vistu tey flestu av egnum lívsroyndum. Forvinnur ein familja t.d. 300.000 kr. árliga, og hevur føst lán til hús, innbúgv, bil og bát umframt at skulu uppihalda lívinum og inntøkan bráddliga minkar við 60.000 kr. niður á 240.000 kr. so merkir henda familjan tað sera væl. Ein slík familja hevði verið noydd at gjørt nøkur væl. Maðurin hevði t.d. verið noyddur selt bátin ella mátti lánið hækkast!

Í yvirførdum týdningi hevur skerdi blokkurin havt við sær júst somu avleiðingar fyri Føroyska samfelagið. "Báturin" má seljast!

Eitt berghol, onkur vegagerð og ein samferðsluhavn í Suðuroy verða av ongum, fyribils í hvussu er. Gásadalsbergholið verður, sum ikki einaferð, sett á "hold". Aðrar vegagerðir verða toygdar ella als ikki gjørdar. Pláss er ikki fyri 150 millióna skattalættanum, sum lyftið var givið um; pláss er ikki fyri lógásettu 32 milliónunum til byrjan av Norðoyðatunnlinum o.s.fr. o.s.fr. Hetta bert fyri at nevna okkurt úr rúgvuni, sum pláss nú ikki er fyri á trongu fíggjarlógini.

**Ávarðaðu**
Vit vóru fleiri, sum ávaraðu móti skerjingini í blokkinum og at tað fór at fáa álvarsligar avleiðingar at minka inntøkur landskassans so ógvusliga upp á ein gang. Eini 100 mill. kr. vóru tey flestu kortini samd um, hevði landskassin tola at mist uttan tær stóru avleiðingarnar. Og søgan prógvar so bara nú, at vit høvdu rætt og at yvirivrigu loysingarfólkini í Fólka- og Tjóðveldisflokkinum fóru skeiv.

**Ein skinsom gongd**
Ikki tí, eg eri ikki ímóti loysing frá dønum og tað er tann flokkur eg eri limur av heldur ikki, men vit í Miðflokkinum hava allatíðina víst á, at heldur enn at "forera" dønum hundraðtals milliónir, eiga vit at nýta henda pening at gera okkum leys av skuld og til at dagføra samfelagið við - og tað treingir sanniliga til - eftir 12 árum í kreppu eru flestøll øki á almenna økinum niðurslitin og tilafturskomin í mun til dagsins standard í teimum londum vit sammeta okkum við. Leys av skuld og við einum dagførdum samfelag eru vit tilreiðar at seta fót undir egið borð sum fríir menn og fríar kvinnur! Tíveri hava okkara samgongufelagar ikki skilt henda so einfalda og greiða boðskap enn.

**Vandamikil leið**
Við allari virðing, so má ein siga, at vegurin Fólkaflokkurin og Tjóðveldisflokkurin hava vælt at ganga ímóti loysingini, er bæði illgongdur og vandamikil. Og tá hugsi eg um hugtakið, "tí tryggu loysingina", sum hóast alt flest allir føroyingar ganga inn fyri.

Sjálvandi kunnu vit loysa her og nú og so takað skrædlið. Spurningurin er bara, vórðu vit kortini fræls um vit gjørdu á henda hátt?

Vit skulu jú liva í hesum landi og til tess krevst peningur. Vit megna tíverri ikki sum er sjálvi at fíggja hetta samfelagið, og kemur peningurin ikki úr Danmark sum stuðul, so má hann lænast onkustaðni. Tað er kaldi veruleikin, alt annað tos er reingjan av veruleikanum og rein propaganda, tað vita øll skilagóð fólk. Stuðul skal ikki gjaldast aftur - tað skal lán. Tí er tað, so leingi vit ikki eru fullkomuliga fíggjarliga óheft, skilabest at vera verandi í ríkisfelagsskapinum.

**Tolin trívst**
Við tolni og við Guds hjálp fara vit at vinna á mál. Vit taka tað tíð, ið skal til at gjalda okkara uttanlandaskuld niður, og vit taka tað tíð, ið skal til at dagføra samfelagið upp á eitt hóskandi støði.

Tað nyttar onki at "spæla ótolin" og tað ger bara skaða býttisliga at royna at skunda undir tingini, sum t.d. við áður umtalaðu 400 millióna skerjing.

Skerjingin av blokkinum hevur og ferð at draga loysingina út, heldur enn at skunda undir hana! Og ikki minst tí vóru vit ímóti skerjingini. Men gjørt er gjørt og vit mugu tí í dag, sum bretar so skemtiliga siga "face the music" - taka avleiðingarnar.

Tað ber fíggjarlógin fyri 2003 greið boð um!

*Framhald av síðu 10*

orðabókastarv. Mikla forlagsvirksemi felagsins við orðabókum og vísindaritum av ymsum slag er ein annar sera týðandi táttur. Og aftrat Fróðskaparritum hava vit nú fingið almenna vísindatíðarritið Frøði.

Felagið hátíðarheldur 50 ára stovningardag sín við tiltøkum í Norðurlandahúsinum 23.-25. oktober. Tey fevna um almenna fyrilestrarøð við heitinum "Úrvalsfyrilestrar - dømi um føroyska gransking í nútíðini", almenna samkomu við heiðursfyrilestri til áminnis um Chr. Matras professara, handing av sømdargávu úr Grunni Kristjans á Brekkumørk, og at enda hátíðarløtu og móttøku.

Í sambandi við 50 ára stovningarhald Føroya Fróðskaparfelags verða hesi tiltøk í Norðurlandahúsinum 23.- 25. oktober 2002:

Almenn fyrilestrarrøð við felagsheitinum: Úrvalsfyrilestrar - dømi um føroyska gransking í nútíðini.

Mikudagin 23. oktober
kl. 16.00
Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingur, cand.mag.
Úr tingsøguni
kl. 17.15
Kirsten Brix, bókmentafrøðingur, ph.d.
Upplýsingarhugtakið og Regin í Líð

Hósdagin 24. oktober
kl. 16.00
Knud Simonsen, havfrøðingur, dr.scient.
Djúpvatnsgerð í Grønlandshavninum og rákið við Føroyar
kl. 17.15
Hóraldur Joensen, evnafrøðingur, dr.scient.
Fitisýrur og fiskastovnar
kl. 19.30:
Almenn samkoma við heiðursfyrilestri til áminnis um Chr. Matras professara og handing av sømdargávu úr Grunni Kristjans á Brekkumørk.
Fyrilesturin heldur Anne-Kari Skarðhamar, dr.art., Høgskolen i Oslo. Heitið: Erindringens Poetikk - en innfallsvinkel til Christian Matras' lyrikk.

Fríggjadagin 25. oktober
verður boðið til hátíðarløtu og móttøku, siga Føroya Fróðskaparfelag, Fróðskaparsetur Føroya og Norðurlandahúsið.

# Ókeypis ferð til Oslo, Stockholm og Helsinki í eina viku – alt goldið

**TÍÐINDASKRIV**

Hetta tilboð hava ung í miðnámsskúlunum kring øll norðurlond fingið og 23 eru útvald at luttaka í norðurlendsku verkætlanini: NiF / Nordisk demokrati i fokus 2002.

Komandi vikuna kemur Norðurlandaráðið saman fyri 50. ferð. Hetta verður heiðrað við nógvum ymsum tiltøkum. Evnið fyri jubileumsárið hjá Norðurlandaráðnum er demokrati. Og hetta evni er eisini arbeiðssetningurin hjá norðurlendsku ungdóms web-redaktiónini, ið verður sett upp í Helsinki komandi mánadag 28. oktober 2002.

**Ung gera tíðindi til Ung á internetinum**
Av teimum 23 ungu í ferðalagnum, eru 8 vald út at mynda eina serliga web-redaktión, sum skal bera tíðindi til ung, sum video-innsløg, beinleiðis úr Helsinki á internetinum.

Tað krevur nógv av teimum ungu at fáa tey "at spinna gull úr gamlari ull" og tað munnu ivaleyst fleiri av teimum ungu halda, um norðurlendska politiska arbeiði. Tað sýnist sum, at ung ikki vilja kennast við tað norðurlendska arbeiðið og demokrati. Ung eru ikki politisk aktiv ídag, sigur onkur. Men tað nýtast tey heldur ikki í hesum redaktionella arbeiðnum. Tey ungu skulu vera sín egin redaktión, velja vinklar og evnir út úr mongdini av møguligum evnum, ið Norðurlanda Ráðið hevur at bjóða. Og so kunnu nýtarnir av heimasíðuni og kjaksíðuni sjálvi gera sær sína politisku fatan.

**Speedarin í botn, World Wide í einum Ferrari**
Mánadagin fer redaktiónin til verka og tá verða at síggja á heimasíðuni: www.odin.dk/demokrati/video-upptøkur við og av ungum tíðindafólkunum heilt úr Grønlandi til Finlands, Ålandi til Føroya, Danmark og Noregi, Íslandi og Svøríki.

Væntandi verða 30 video-innsløg at síggja á internetinum, tá redaktiónin endar mikukvøldið í komandi viku – og vónandi verða fleiri skrivaðar greinar við. Málið verður skandinaviskt og enskt.

Fyri fólk, ið vanliga arbeiða ella fáast við internetið, er tað at koma til Finlands eitt "Internet - Mekka". Internetsambandið har er so vælsignað og gott og 10 Mbit internetsamband er sum at koma í himmiríki.

Tað vil fyri føroyingar og grønlendingar kennast sum at býta tí 3-hjulaðu súkkluna um við ein Ferrari. Eisini hevur samstarvsfelagin í Helsinki, ið húsar redaktiónini, "Kompassi", givið redaktiónini eina interaktiva feed-back heimasíðu. Tá hava fólk, eisini við okkara internetsambandið í Føroyum, møguleika at luttaka beinleiðis í kjakinum og kunnu biðja redaktiónina um at seta politikarum og embætisfólki í Helsinki sínar spurningar - og tað er alt sera demokratiskt.

Projektleiðari á ungdóms web-redaktiónini er Laufey H. Blaasvær, ið hevur roynt eina slíka web-redaktión áður í Reykjavik fyri 2 árum síðani, ið eyðnaðist stak væl. Eftir at stjórin í Norðurlandahúsinum í Reykjavík, Riitaa Heinemaa, hevur kunnað Norden i Fokus um henda møguleika at lata ung samskifta við ung á ein nútíðar og ungdómligan máta, hava "NIF" skrivstovurnar valt at seta eina web-redaktión upp, eina ferð enn. Úr Føroyum er tað 18 ára gamli Heiðrik á Heygum, ið luttekur í verkætlanini og web-redaktiónini.

Skráin hjá teimum ungu, í NIF-verkætlanini, er eisini í Helsinki, sum er 3. og síðsti staðurin vitja verður á námsferðini, sera fjølbroytt og víttfevnandi. Tey ungu fara m.a. at vitja finska tíðarritið "Helsingin Sanomat" og práta við finsk blaðfólk. Tey fara at møta ungdómspolitikarum frá UNR, "Ungdomens Nordiska Rådet". Vitja finsku ungdómsorganisatiónina "Allians" og gamla studentarhúsið, við tí norðurlendska torginum. Tey skulu sjálvandi eisini luttaka í Sessiónini 2002, har Norðurlandaráðið hittist fyri 50. ferð. Og undirhald verður á skránni við norðurlendsku ungdómskonsertini, "Hiphop Norden". At enda skula tey eisini hitta sjtóran á Nifin, Ole Norrback, sum fer at røða um, "Nordbornas rättigheter".

Vit vóna at skúlar, ung og hvør tann, ið sýnir áhuga fyri okkara felags norðurlendsku grannum, fara at nýta høvi at vitja heimasíðuna www.odin.dk/demokrati/, og luttaka í norðurlendska kjakinum um demokrati, umhvørvi og samleika.